# Bjargingin komin



*Umboð fyri bjargingarfeløgini vóru komin at hyggja nærri at bilunum týsdagin. F.v. Regin Jespersen, Jens Hansen, Tórhallur Simonsen, Rógvi F. Johansen og Dánjal Pauli Poulsen.*

**Gamla ynski hjá Bjarningarfeløgunum í Føroyum er nú gjørt til veruleika. Tríggir ikki heilt nýggir bilar eru komnir úr Danmark at hjálpa bjargingarfeløgunum við teirra arbeiði kring landið**

BJARGING
*Heri á Rógvi*
*Myndir: Jens Kr. Vang*

Tað eru 10 bjargingarfeløg kring landið. Hesi bjargingarfeløg eru savnaði í eitt landsfelag, sum kallast fyri LSB. Bjargingarfeløgini í Føroyum fáa umvegis stýri játtan á fíggjarlógini. Játtanin hevur verið umleið 18.000 fyri hvørt felagið, men alskurin til bjargingarfeløgini er eftir øllum at døma vaksin, tá ið játtanin í ár liggur um 30.000 fyri hvørt bjargingarfelag. Ein forkláring uppá øktu játtanina kundi eisini verið, at landsins myndugleikar hava skipað eina sokallaða tilbúgvingarætlan, sum eisini skal setast í samband við vaksandi oljuvinnuna í Føroyum.

Bjargingar feløgini í Havn, Vágunum og Suðuroyar norðara bjargingarfelag fingu týsdagin hvør sín bil til útgerð og annað. Talan er um Mercedez 911 bilar, sum eftir hvat skilst hava verið rættiliga væl umtóktir í seksti- og sjeytiárunum.

Tað er í veruleikanum rætt at siga, at tey fingu bilarnar, hóast tey hvør í sær máttu lata 35.000 kr. fyri hesar. Bilarnir hava fyri so vítt eitt nógv hægri virði enn hetta, og teir eru eisini nýgjørdir fyri munandi meira enn 35.000. Tað er Beredskabs Korpset, sum hevur selt føroysku feløgunum bilarnar. Bilarnarnir eru millum 32 og 34 ára gamlir...

### Tilbúgving

Ætlanin er, at bilarnir skulu nýtast í sambandi við tilbúgving. Tað vera ikki hesir bilarnir, sum fara at rykkja út við tí rúkandi ferð, tá ið tað mestir verður trupult at ota seg upp um teir 60 kilometrarnar um tíman.

– Ætlanin er at hava útgerð í bilinum, soleiðis at vit eru betri førir fyri at fara út, sigur Tórhallur Simonsen, formaður í Vága bjargingarfelag.

Vága Bjargingarfelag hevur eitt limatal áljóðandi einar 330 limir, og hetta má sigast at vera eitt rættiligur fittur biti av vágafólki. Støðan hjá Vága bjargingarfelag hevur higartil verið, at einasta akfarið teir hava kunna nýtt til flutning hevur verið ein viðfestisvognur. Hetta er ikki nøkur góð loysn í longdini, so Tórhallur fegnast um, at teir hava fingið henda nýggja bilin. Hann væntar ikki, at aldurin verður nakað trupulleiki.

Eisini Rógvi Finnsson Johansen, samskipari av tilbúgvingarætlanini, fegnast yvir, at tað hevur eydnast at fingið bilarnar til landið, og fyri ein so høgligan prís. Hann greiðir frá, at hóast bilarnir eru í tí eldra endanum, so hava teir koyrt ógvuliga lítið. Somuleiðis vísir hann á, at bilarnir hava allir tann bláa tríkantin settan á bilin, og hetta er tann altjóða viðurkenda frámerki fyri bjarging.

Jens Hansen, sum er formaður fyri bæði Havnar bjargingarfelag og LSB, heldur, at teir í Havn hava mist líka stóran á hesum bilunum sum aðrastaðni. Hann vísir á, at teir í sambandi við tunnililin millum Kollafjørð og Kaldbak skulu vera við í einari tilbúgvingarætlan. Hóast teir í løtuni ikki hava teir nógvu limirnar, so væntar teir, at fleiri fara at leggjast afturat.



*Bilarnir hjá bjargingarfeløgunum eru millum 32 og 34 ára gamlir.*

## Størri jólagávur í ár

Markið fyri, nær ein jólagáva frá arbeiðsgevara verður skattað, er hækkað úr kr. 500 upp í kr. 1.500. Hetta stendur at lesa í nýggjasta tíðindabrævinum frá grannskoðaravirkinum Rasmussen og Weihe.

Hetta merkir, at starvsfólk kring landið óivað kunnu byrja at gleða seg til at arbeiðsgevarin fer at geva teimum ein serliga stóran og góðan pakka í ár. Í tíðindabrævinum stendur víðari at lesa, at eftir lógini eru gávur skattskyldugar, og verður gáva latin í peningi ella gávukorti, er hon skattskyldug uttan mun til upphædd.

Tað eru gávur við serstøkum høvi í naturalia frá arbeiðsgevara, sum eru skattskyldaður, tá ið prísurin ikki fer upp um 1.500 íroknað Mvg. Fer prísurin upp um 1.500 íroknað, skal øll upphæddin skattast.

Av øðrum forvitnisligum í tíðindabrævinum kann eisini nevnast, at skattastigin frá 1. januar 2001 er broyttur. Hetta merkir, at Botnfrádráttsurin, t.e. tann parturin av inntøkuni, sum ikki verður skattaður, verður hækkaður frá 17.000 til 19.000. Komandi ár verður botnfrádrátturin 21.000 kr. Eisini aðrar broytingar eru gjørdar. Í Tíðindabrævinum hjá Rasmussen og Weihe verður roknað við, at hetta fer at kosta kommununum 50 mío í ár og 30 næsta ár.